Kommunufelagið

Føroya Løgting
Áarvegur 2
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting
16. apríl 2018

Okkara j.nr.
18/01576-2

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.

**Viðv.: Løgtingsmál nr. 78/2017 broyting í kommunustýrislógini (um borgarstjórar)**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerking til omanfyri nevnda lógaruppskot, hetta sum uppfylging av hoyringini í rættarnevndini í Løgtinginum 21. mars 2018.

Kommunufelagið tekur undir við uppskotinum um, at borgarstjóri kann røkja onnur størv, sum eru beinleiðis fólkavald, uttan at hetta krevur loyvi frá kommunustýrinum, og tekur felagið eisini undir við teimum sjónarmiðum, sum víst eru á í viðmerkingunum.

Galdandi áseting í kommunustýrislógini er eitt undantak til høvuðsregluna um, at borgarstjóri annars skal leggja øll onnur størv frá sær.

Hóast júst hetta uppskotið ikki leggur upp til at broyta høvuðsregluna, so loyva vit okkum tó at vísa á, at høvið átti at verið nýtt til at kjakast um, hvørja støðu ein borgarstjóri skal hava í einum samfelagi. Kjakið um, hvørt ein borgarstjóri skal hava onnur størv, tekur oftast útgangsstøði í teirri støðu, at borgarstjórar eisini eru vald á ting. Sæð í mun til leiklutin sum borgarstjóri, er hetta ikki rætta útgangsstøðið fyri kjakinum. Rætta útgangsstøði fyri hesum kjaki má vera, hvat er best fyri lokala samfelagið, og ikki um ella hvussu stóra ávirkan viðkomandi hevur á tingi.

Hin støðan - at tingfólk verða vald til borgarstjóra – er eisini áhugaverd. Hetta er tó ein spurningur um starvsøkið og treytir hjá tingfólki sum heild, uttan mun til um viðkomandi starvast sum borgarstjóri, lækni, sjálvstøðugur vinnurekandi, bókhaldari, lærari ella okkurt annað. Um løgtingið ynskir at broyta reglurnar ella gera nærri reglur fyri, hvørji onnur størv tingfólk kunnu hava, tá er tað atlitið at tingarbeiðinum, ið hevur størstan týdning.

Onnur avleiðing av ov stirvnari skipan í sambandi við kommunustýrisarbeiði er, at tað kunnu koma at liggja óneyðugar forðingar fyri, hvør bjóðar seg fram sum borgarstjóra. Eru treytirnar soleiðis, at skipanin í veruleikanum útihýsir fólki frá at bjóða seg fram, tí tey missa meira enn tey vilja geva, so er skipanin ikki serliga skynsom. Dømi kann vera um borgarstjóra sum fær munandi lægri løn, enn starvsfólk, hann er leiðari fyri. Annað dømi kundi verið, at borgarstjóri má leggja betri lønt borgarligt ella vinnuligt starv frá sær fyri at røkja eitt starv sum fólkavalt umboð.

Kommunufelagið

Vísandi til omanfyri standandi so tekur Kommunufelagið undir við uppskotinum, men heldur samstundis, at øll skipanin við borgarstjórum og starvstreytum teirra annars átti at verið endurskoðað undir einum.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri